# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# 150 klipp í seks mánaðir

**Fyrsta hálvárið við nýggju klippikortsskipanini hevur løgreglan klipt í koyrikortið hjá 145 bilførarunum. Fimm teirra hava fingið tvey klipp**

FERÐSLA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta verður upplýst á heimasíðuni hjá Landsverki, har hagtøl fyri fyrstu seks mánaðirnar eru at finna.

Í flestu førunum er talan um ov høga ferð, vantandi íbinding í trygdarbelti og ólógligar yvirhálingar,

76 bilførar við persónbilum hava fingið klipp í koyrikortið, tí ferðin hevur verið í minsta lagi 20 km/t oman fyri tað, sum loyvt er. 38 bilførar fingu klipp, tí hesi ikki ansaðu eftir, um børn undir 15 ár vóru spent fast í trygdarbelti. 14 bilførar hava fingið klipp fyri yvirháling, har forboð er móti hesum. Og tveir bilførarar hava fingið klipp fyri beinleiðis skilaleysa yvirháling.

Hartil eru eisini onnur brot, ið klipt er fyri. Fimm ferðir fyri at hava koyrt um reytt ljós. Fimm ferðir fyri brot á ásetingarnar um víkiskyldu. Fimm ferðir fyri at koyra um hindrunarstriku Tríggjar ferðir fyri ikki at halfa fjarstøðu til framman fyri koyrandi akfar og tvær ferðir fyri at hava koyrt í mótkoyrandi farbreyt.



*Tað er fyrst og fremst ov høg ferð, sum er atvold til klipp í koyrikortið. Tað hevur higar til kostað beint yvir helvtina av teimum 150 klippunum, sum eru klipt*




www.sosialurin.fo Leys størv á Sosialinum




## Bókhaldari

**Ein fyritøka í vøkstri krevur eisini vøkstur í umsitingini.**

Tí søkja vit nú eftir fólki at arbeiða í bókhaldi okkara hálva tíð. Framman undan eru trý fólk í starvi í bókahdlinum.

Starvið fevnir um alt vanligt bókhaldsarbeiði, herundir bókingar av inntøkum og útreiðslum, avstemmanir og debetor- og kreditorrøkt.

Vit kunnu bjóða tær eitt avbjóðandi starv í einum spennandi umhvørvi í eini fyritøku, sum er í støðugari menning, og sum í dag virkar á fleiri miðlapallum. Og vit ímynda okkum, at tú ert til reiðar at byrja í nýggja starvinum í seinasta lagi 1. september – men um møguligt gjarna fyri hetta.

Er áhugi at frætta meira um starvið, ber sjálvandi til at ringja til okkara á telefon 341800 og tosa við Jákup Mørk ella Johonnu Vang. Sjálvandi ber eisini til at senda teldubræv til jakup@sosialurin.fo ella til johanna@sosialurin.fo

Umsóknir við viðkomandi upplýsingum eiga í seinasta lagi tann 20. juli at verða sendar til

Sosialurin
Postsmoga 76
FO-110 Tórshavn

*Sosialurin hevur vaksið um virksemi frá at verða eitt tíðindablað , til at verða stórsta fjølmiðlafyritøkan í landinum. Fyritøkan umfatar Sosialin, Rás2, S-lýsingar, Portalurin, Sportal, Planet.fo, Rás1 og Miðlahúsið. Tilsamans starvast í dag umleið 45 starvsfólk í fyritøkuni.*